GRANT

# Týðandi kunning

## Tak væl ímóti vøruni

*Takk fyri at tú hevur keypt vørur frá GRANT. Niðanfyri eru góð ráð og vegleiðing um, hvussu tú tekur væl ímóti vøruni og goymir hana trygt, til tú skalt brúka hana.*
*Vit vóna, at tú gerst glað/ur fyri vøruna, og at hon fer at halda leingi.*

### EFTIRKANNA VØRUNA!

**So skjótt vøran er latin tær, eigur tú at eftirkanna vøruna, og tryggja tær at alt er við, og at vøran er soleiðis, sum avtalað er. Skuldi onkur feilur ella mangul verið, so er umráðandi at boða okkum frá hesum beinanvegin!**
**Frætta vit onki frá tær beinanvegin, meta vit at veitingin er góðkend og avgreidd. Eftir hetta fellur garanti uppá flutningsskaðar burtur.**

### FLUTNINGUR OG MÓTTØKA

Tá tú tekur ímóti vøruni og skalt flyta hana ella seta hana á goymslu, er tað týdningarmikið at brúka røttu amboðini og hjálpartólini, soleiðis at hvørki tú ella vøran fær skaða.

### MERKIR OG KORK-KNAPPAR

Klistrimerkir og korkknappar, sum eru klistrað beint á glasið, skulu takast av beinanvegin – ella innan eina til tvær vikur eftir móttøku av vøruni. Annað, so sum hornaverjur, pakkifolie ella annað verjandi pakkitilfar, skal *ikki* takast av fyrr enn vøran (vindeyga/hurðin) skal setast í.

### STENDUR VØRAN ÚTI

Um vøran skal goymast úti, er tað týdningarmikið at hon stendur trygt, t.d. fest á træplattar, soleiðis at hon hvørki kann detta ella hevur beinleiðis samband við undirlagið, jørð ella gólv. Vøran eigur at vera álítandi innpakkað, og skal verjast móti regni, kava, vindi og dálking. Samstundis skal vøran pakkast soleiðis, at luftrensl er um vøruna, fyri at fyribyrgja rusti og kondensi. Leysir lutir skulu takast inn undir tak.

**VIT VÓNA AT TÍN NÝGGJA VØRA ROYNIST TÆR VÆL**

**TAKK FYRI AT TÚ KEYPTI FRÁ GRANT**

Vinarliga heilsan

GRANT

Fylgiseðil standard, dagført okt. 2020